Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Í Gjaldstovuni arbei›a uml. 30 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle Financials. Av ø›rum skipanum kunnu ver›a nevndar: Felags lønarskipan, Búskettskipan, Lei›slukunningarskipan og Dátuvøruhús.

- Fíggjardeildin hevur ábyrgdina at rá›geva um Búskaparskipan Landsins t.d. í høvu›sbóka-, debitora-, kreditora- og ø›rum skipanum.
- Deildin luttekur, tá i› n‡ggjar skipanir ver›a kravfestar og tiknar í n‡tslu. Deildin er eisini vi› í landsroknskapar- og fíggjarlógararbei›inum. Hon skal somulei›is vera vi› til at menna fíggjarst‡ringina hjá tí almenna og at røkja Búskettskipanina, Lei›slukunningarskipanina og heimasí›una hjá Gjaldstovuni.
- Talan er um gó›ar arbei›sumstø›ur, bæ›i tá i› ræ›ur um høli og útbúna›.

Gjaldstovan hevur eina fleksti›arskipan, og í Fíggjarmálará›num eru gó› kantinuvi›urskifti.

Meira um hetta er at lesa á heimasí›uni hjá Gjaldstovuni.

Í løtuni n‡ta o. u. 800 brúkarar Búskaparskipan landsins.

Heimasí›a: **www.gjaldstovan.fo**

# Úrvalsbrúkari innan roknskap og EDV



Nú eitt av okkara dugnaligu starvsfólkum hevur valt at fara undir hægri útbúgving, er eitt starv sum úrvalsbrúkari í Fíggjardeildini á Gjaldstovuni leyst at søkja. Ert tú tann rætta/rætti, kunnu vit bjó›a tær eitt spennandi starv innan roknskap og EDV.

Ábyrgdarøki› ver›ur at rá›geva og undirvísa í skipanum undir BSL, gera veglei›ingar og mannagongdir, gera úrrit og annars at skapa kunning vi› dátum í EDV-skipanum, røkja og menna heimasí›una og vera vi›, tá i› n‡ggj tøkni og skipanir skulu ver›a tiknar í n‡tslu.

Tann, sum ver›ur sett/ur, skal hava útbúgving innan roknskap og/ella EDV sum t.d. HH, HA, datanom, datamatikara v.m., hava gó›an kunnleika til bókhald, roknskap og til bókhaldskipanir, duga at skriva føroyskt og kenna vanligar skrivstovuskipanir sum outlook, word og excel. Ta› er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur royndir innan roknskaparøki› og EDV. Men tey, i› júst hava loki› eina útbúgving, kunnu eisini søkja.

Dentur ver›ur lagdur á, at tann, i› ver›ur sett/ur, kann arbei›a sjálvstø›ugt og hevur gó› evni at samskifta vi› onnur, t.d. tá i› undirvíst ver›ur í skipanum.

Í byrjanartí›ini ver›ur upplæring um tær ney›ugu skipanirnar.

Lønar- og setanarvi›urskifti eru samb. sáttmála millum Starvsmannafelagi› og Fíggjarmálará›i› alt eftir útbúgving og royndum. Arbei›stí›in ver›ur 39 tímar um vikuna.

Umsókn vi› skjølum og CV skulu ver›a **Føroya Gjaldstovu, Boks 2009, 165 Argjum** í hendi innan 8. november 2004.

Hans Petur Joensen tlf. 352455, sum er deildarlei›ari, er fúsur at svara spurningum starvinum vi›víkjandi.

Dimmalætting


# Torbein Dam deyður



Mánadagin 18. oktober andaðist Torbein Dam í Havn, 72 ára gamal. Hann var sonur Annu, sum var ættað úr Skálavík, og Erik Dam úr Havn. Torbein vaks upp á Heygsbreyt. Anna og Erik áttu 9 børn: Anna Poulina, Lena, William, Brynjolvur, Frank, Tróndur, Una, Torbein og Eivind. Í fjørutiárunum var húsið meint rakt av tuberklum. Øll børnini høvdu smittuna, og Anna Poulina og William doyðu av sjúkuni. Helst var tað dag um dag.

Torbein var giftur við Alexandrinu (Dinnu) úr Fuglafirði. Tey bygdu á trønni hjá pápanum við Marknagilsvegin. Tey fingu dóttrina Annu, sum er gift við Magnusi Magnussen, og synirnar William og Leif.

Sum ungur var Torbein ein túr í Grønlandi sum messur við Oyrnafjall, men annars arbeiddi hann á landi. Hann var arbeiðsmaður og arbeiddi í mong ár á húsavirkinum hjá systkinabarninum Hans Hilmar Dam. Tey nógvu seinastu árini arbeiddi hann hjá SEV.

Torbein var lágur á vøkstri, men sterkur. Skemtingarsamur og stuttligur at vera saman við. Hann var havnarmaður við stórum H og haraftrat HB-ari um ein háls.

## 90 ára føðingardagur

Í dag, 22. oktober, fyllir Anna Hansen, Saltnes, 90 ár.

Dagurin verður hildin hjá Jórun og Dakku.





## SELJARI SØKIST

Av tí at sølan av retail, catering og feskum vørum er í støðugari menning søkir P/F United Seafood eftir seljara.

United Seafood eigur 7 fiskavirkir og eru hesi spjødd um alt landið.

Felagið hevur drúgvar royndir við at hagreiða øll fiskasløg, serliga upsa, tosk, hýsu, svartkalva og kongafisk.

Vørurnar, ið virkaðar verða, eru á høgum góðskustigi og fevna um m.a. frystar vørur, saltaðar vørur, feskar vørur, catering vørur og retail vørur.

Uppgávurnar hjá seljaranum verða m.a.

- samstarv og samskifti við keyparar av vørunum
- samstarv um keyp av rávøru
- samstarv við søluleiðslu og virkisleiðarnar

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar

- relevanta útbúgving á passandi støði
- kunnleika til og royndir innan sølu av fiski
- kunnleika til framleiðslu á fiskavirkjum
- góðan málkunnleika
- góð samstarvs- og kommunkatiónsevni

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Umsóknarfreistin er 25. oktober.

Um áhugi er fyri hesum starvi, kunna tygum seta tygum í samband við:

UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking
att: Símun P. Jacobsen
Postboks 218
FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tel +298 35 55 55
Fax +298 35 55 50

UNITED seafood "Fish products from pristine waters"

REPROZ


## Dagurin

**22. oktober. Cordula.** Hon var ein av teimum 11.000 moyggjunum, sum sagt var frá tann 21. oktober.

i
Sosialurin



# HB – eitt undangongufelag fyri onnur eisini

FØÐINGARDAGUR
*Jan Müller*



Millum gestarøðararnar á stóru HB móttøkuni í Norðurlandahúsinum seinasta sunnudag var eisini forsetin í ÍSF, Heðin Mortensen. Hann helt fyri, at hetta er ikki bert ein stórur dagur fyri HB, tað er eisini ein stórur dagur fyri ítróttin í Føroyum.

Heðin Mortensen vísti á, at HB hevur altíð millum manna verið roknað sum eitt av teimum stóru - og hevur eisini verið tað. Altíð frammalaga og altíð ført fyri at gera vart við seg.

– Við einari heilari øld á baki telist Havnar Bótfelag millum elstu ítróttafeløg í landinum. Hetta gevur eina serstøðu, ið felagið tó hevur megnað at røkt so væl, at tað í mangar mátar hevur verið eitt undangongufelag fyri onnur.

Aldurin í sjálvum sær er merkisverdur, men ikki minni áhugavert er tað at síggja, at HB telist millum teirra, ið eldist við yndi. Hetta sæst ikki minst aftur í, at felagið støðugt hevur ment seg og tikið við nýggjum avbjóðingum segði ÍSF forsetin og vísti á, at einki annað felag hevur vunnið so nógv sum HB, tað verið seg sum steypavinnari og føroyameistari.

Fyri Havnina hevur HB eisini altíð havt sera stóran týdning, og saman við øðrum feløgum í býnum, hevur felagið givið ungdóminum eitt gott og mennandi frítíðarítriv, sum hjá teimum flestu man hava verið orsøk til mong og góð minni, tá nøkur ár eru fráliðin.

– Eg tori at siga, at Havnin hevði verið fátøk, um vit ikki høvdu tykkum, og her vil eg eisini fegin takka fyri alt, tit í HB hava gjørt líka síðan 1904. Illa ber til at gera hetta upp í verðsligum virðum, so hóast tøkkin kanska kann kennast fátækslig, skal hon so sanniliga ikki liggja eftir segði Heðin Mortensen og helt fram:

– Ítróttarsamband Føroya skal eisini her bera HB eina stóra tøkk fyri stuðul øll árini síðan 1939, tá ÍSF varð sett á stovn. Frá fyrsta degi sóu havnamenn týdningin av at fáa samskipa ítróttin í Føroyum, og saman við øðrum vóru teir við til at leggja lunnar undir ÍSF.

Í mínum arbeiði sum forseti í Ítróttasamband Føroy og við mentunarpolitikki havi eg sæð, at eingin ivi er um tann týdning, tað hevur fyri trivnað og menning í landi okkara, at vit eiga ein virknan ungdóm, sum ikki sparir seg, men vil leggja tíð og mátt í at røkja tann mentunararv, ið sprottin er úr føroyskum jørðildi.

Vit, sum fáast við ítrótt og tískil hava dagligt samband og samstarv við ta fjøld av fólki í øllum aldri, ið er virkin innan ítróttin - serliga ungdóm, kvinnu sum mann - undrast og fegnast støðugt yvir, hvussu eldhugi og sjálvsofran kunnu flyta fjøll - og gera tað.

At HB hevur eina glæsiliga fortíð, finna vit so mong dømi um tá ein lesur bókina Havnarmenn í Gundadali, har Jógvan Arge sigur frá um tey fyrstu 50 árini. Tíðin hevur ikki verið minni glæsilig seinastu 50 árini, sum Suni Merkisstein í nýggjari bók kemur at siga okkum frá. Vit gleða okkum at síggja og lesa hetta megnarverk um HB.

Men í øllum hesum hava tit ongantíð læst tykkum føst í fortíðina. Framtíðin hevur altíð staðið frammaliga, og tit hava dugað at sæð týdningin í, at ungt fólk tekur við, har tey gomlu sleppa. Ungdómurin og gott ungdómsarbeiði eru grundvøllir undir framtíðini hjá HB.

Hetta er ein stórur dagur hjá HB í dag. 100 ár eru liðin, síðan havnarmenn tann 4. oktober 1904 stovnaðu fótbóltsfelagið, Havnar Bóltfelag,

Ítróttarsamband Føroya hevur eftir ynski frá felagnum, valt at heiðra HB við peningagávu, og kundu vit hugsa okkum, at peningurin verður brúktur til tey ungu. Har liggur framtíðin hjá felagnum.

Ítróttasamband Føroya hevur gjørt eitt skreytblað í samband við dagin og eru orðini, sum eru skrivað til føðingardagsbarnið HB hesi:

Eina øld hevur slóðarin gingið á odda.
Uppalt ungling til mann,
- til frama fyri felag,
einstakling og samfelag.

*Hart hevur leikað á,*
*men fremst í gonguni*
*eru varðar laðaðir,*
*so lætt hevur verið at elt*
*slóðbrótaran,*
*sum kynt hevur loga, ið*
*hevur tænt sum viti.*

*Ein fyrimynd.*

*Øldin er rokkin, men*
*framvegis,*
*spelkin sum unglingi,*
*verður brotið upp úr*
*nýggjum.*

*Avbjóðingar bíða*
*- og slóðarin er til reiðar.*

*Hjartaliga tillukku*
*ynskir*
*Ítróttasamband Føroya*

# Børnini aftur upp á gólv

TÍÐINDASKRIV

Aftur í vetur skipar Tøkum Lætt fyri barnadansi. Byrjað varð 20. oktober. Ætlanin er, at børnini skulu fáa eina hugnaliga løtu har høðursdenturin verður lagdur á kvæðini. Men tað verður eisini pláss fyri eini hugnaligari løtu við onkrum leskandi og eini góðari søgn ella einum góðum ævintýri.

Dansað verður hvørt mikukvøld kl. 19.00 - 20.00.

Øll børn eru hjartaliga vælkomin - tey heilt smáu skulu helst hava ein vaksnan við sær. Størri bólkar til dømis ein skúlaklassi við lærara eru eisini vælkomin at luttaka, so kunnu vit samstarva soleiðis, at næmingarnir kunnu venja tey kvæði, ið verða tikin í barnadansinum sum ein náttúrligur partur av tí obligatorisku undirvísingini í skúlanum.

Dansurin verður skipaður av sjálvbodnum limum hjá Tøkum Lætt, og luttakandi børn skulu einki gjalda. Øll børnini fáa eitt hefti við kvæðum og vísum til gávu.

# Nýggj stuðulsskipan til lesandi

**Royndarskipan, ið stuðlar føroyingum at lesa hægri lestur uttan fyri tann enskttalandi heimin, sett í verk**

STUÐULSSKIPAN
*tíðindaskriv frá Mentamálaráðnum*

Landstýrismaðurin í mentamálum hevur frá 1. august 2004 sett nýggja ÚSUN-kunngerð í gildi. Størsta broytingin í nýggju kunngerðini er, at nú verður møguligt at fáa stuðul til málslig fyrireikingarskeið til hægri útbúgvingar á ikki enskttalandi lærustovnum í ikki enskttalandi londum uttanfyri Norðurlond.

Talan er í fyrstu atløgu um eina royndarskipan fram til 31. desember 2006.

Mett verður, at í dag lesa umleið 1.300 føroyingar hægri lestur. Við hægri lestur skilst útbúgvingar, ið verða tiknar eftir miðnámsskúla ella líknandi. Av hesum 1.300 lesa umleið 500 í Føroyum og 700 í Norðurlondum - meginparturin í Danmark.

Harafturat lesa í dag umleið 90 føroyingar hægri lestur uttan fyri Norðurlond. Gott og væl 80 av hesum lesa í enskttalandi londum - 40 í Onglandi, 25 í Skottlandi og restin í USA, Avstralia, Kanada, Wales, Írlandi og Ný Sælandi. Bert 7 føroyingar lesa í dag hægri lestur á tí evropeiska meginlandinum.

Tá ið hugsa verður um tað stóra samskiftið, samhandilin og samstarvið, sum føroyingar hava við tað evropeiska meginlandið, og at tað harafturat sum heild er nógv bíligari at lesa á meginlandinum enn í teimum enskttalandi londunum, er tað harmiligt, at ikki fleiri føroyingar taka hægri útbúgvingar har.

Endamálið við nýggju skipanini er at stimbra ungum føroyingum at fara at lesa m.a. á tí evropeiska meginlandinum. Orsøkin til, at so fáir føroyingar lesa har, er helst, at málsligi førleikin í týskum, fronskum, sponskum og møguliga øðrum evropeiskum málum er ikki nóg góður. Fyri at bøta um hetta, verður nú møguligt at fara á málslig fyrireikingarskeið í upp til 6 mánaðir við stuðli frá Stuðulsstovninum.

Krøvini til málsligu fyrireikingarskeiðini eru, at skeiðini skulu vera málsliga førleikagevandi til hægri lestur. Hetta merkir, at luttøkan á skeiðinum ella tann endaliga próvtøkan á skeiðinum er á einum slíkum stigi, at tann lesandi fær tann málsliga førleikan, ið skal til fyri at lesa á hægri lærustovni. Harumframt skulu skeiðini vera fulltíðarskeið við í minsta lagi 15 tímum um vikuna.

Stuðulin verður í fyrstu atløgu veittur sum lán til skúlagjald og lán til livikostnað eftir fylgjandi reglum:

- Til skúlagjaldið verður veitt lán, tó í mesta lagi kr. 20.000. Skúlagjaldið fevnir bert um útreiðslur, ið hava beinleiðis við lesturin at gera.
- Til livikostnað verður veitt lán. Lánsupphæddin, ið verður veitt hvønn mánaða, er mánaðarliga studningsupphæddin, sum til eina og hvørja tíð verður veitt til hægri lestur í Føroyum - skúlaárið 2004/-2005 er henda upphædd kr. 3.462.

Um tann lesandi, innan 15 mánaðar eftir, at málsliga fyrireikingarskeiðið er endað, fer undir hægri lestur á lærustovni, har høvuðsmálið er tað sama, sum tað var á málsliga fyrireikingarskeiðinum, verða lánini umløgd til studning. Umleggingin verður framd eftir, at tann lesandi hevur tikið próvtøkurnar á fyrsta lestrarári í útbúgvingini.

Meira fæst at vita um henda nýggja stuðulsmøguleikan á heimasíðuni hjá Stuðulsstovninum www.studul.fo, har umsóknarblað og vegleiðing er at finna.